# Fríggjakvøld á Jóansøkufestivali







**Samanumtikið var fríggjakvøldið á Jóansøkufestivalinum ein lunkað uppliving. Tónleikurin var góður, men har vóru alt ov fá fólk til at njóta hann. Spurningurin er, um vit nú síggja eina avleiðing av tí kapping, sum teir mongu festivalarnir skapa fyri seg sjálvar.**

JÓANSØKU-FESTIVALUR
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*
*Myndir: Rókur Jákupsson Jakobsen*

Bólkurin India legði fyri. Undirritaði náddi ikki at fáa alla framførsluna við, men tað sindri sum eg hoyrdi var harður rokkur, sum kanska hevur røtur aftur í 80´unum. Tað vóru heilt fá fólk á staðnum tá ið India løgdu út, og hetta darvaði tíanverri upplivingina nakað.

Næstir á pallin vóru lokalu hetjurnar í bólkinum Forgery. Heilt lokalir eru teir kortini ikki, tí teir eru úr Tvøroyri. Tó so tóku áhoyrarar heilt væl ímóti Forgery, sum spæla rokk av tí góða gamla slagnum.

"For %"¤#!?&#, vit mugu hava hesar til Havnar at spæla!". Orðini eigur oddamaðurin í bólkinum Marius, sum stóð og lýddi á Forgery. Tað er sum at hoyra teir bestu mannligu 80´bara sangararnir aftur, tá ið Jens Arne Leo syngur. Hann hevur tann eyðkenda vibratoin, tær eyðkendu hæddirnar og teir eyðkendu myrku tekstirnar, sum Iron Maiden, Halloveen og aðrar hetjur í 80´árunum borðreiddu við. Sangarin í Forgery var púra dominerandi á pallinum, hóast at hann ikki gjørdi nógv burturúr sambandinum við áhoyrararnar. Hansara feitu gávur sum sangari var nokk til, at hann gjørdist tað mest minniliga við Forgery konsertini.

Bólkurin byrjaði konsertina við eini forritan, sum legði upp til eina rokkuta konsert. Har vóru byrsur og onnur kríggjsljóð at hóma, og stílurin var soleiðis lagdur. Samanumtikið var hetta ein fín konsert.

### Bólkurin hjá Brandi Enni var vælumtóktur

Brandur Enni vísti enn einaferð, at hóast sín unga aldur er hann ongin ársungi, tá ið tað snýr seg um at skriva og framføra tónleik. Hansara fangandi niðurløg geva áhoyrarunum góðar sømdir til at njóta tónleikin, tí at tú trallar við løgunum beinanvegin.

Hóast Brandur er oddamaðurin í bólkinum, so skal man minnast til, at hann ikki er einsamallur um at framføra tónleikin. Bólkurin Anytime er mannaður við ungum monnum, og tað leggur tú eisini merki til. Teir eru ikki heilt samanspældir enn, men tað kemur við tíðini.